Kappingareftirlitið

Fredensborg og Omegns Brugsforening
Humlebækvej 2
3480 Fredensborg

Att. Christina Heiberg-Grevy

Tórshavn, tann 29-11-2024

Viðv. mál nr.: 24/00478

Kappingareftirlitið fekk tann 11. november 2024 einfalda fráboðan, sbrt. § 17, stk. 2, um, at Fredensborg og Omegns Brugsforening (FOB) yvirtekur Føroya Keypssamtøku (FK).

Talan er um eina transaktión sum er kemur undir samanleggingarhugtakið í §13, stk. 1, nr. 1 í kappingarlógini. Talan er um eina samanlegging eftir §13, stk. 1, nr. 1 tá tvær ella fleiri fyritøkur, sum hava virkað sjálvstøðugt, verða lagdar saman.

Samanleggingin skal fráboðast, sbrt. §16, stk. 1 í kappingarlógini, tí minst ein av luttakandi fyritøkunum hevði ein árligan umsetning í Føroyum á 75 mió. kr. seinasta ár og minst onnur av luttakandi fyritøkunum hevði ein umsetning á 75. mió. kr. á heimsstigi seinasta ár, sbrt. §14, stk. 1, nr. 2 í kappingarlógini

Luttakandi fyritøkur hava fráboðað eftir einfaldum leisti, tí fráboða er eftir §14, stk. 1, nr. 2, sbrt. § 3, stk. 1, pkt. 4 í reglugerð nr. 2 frá 20. juli 2012.

FOB er ein donsk keypssamtøka við áleið 7.000 limun. FOB eigur og rekur keypssamtøku í Fredensborg Kommune og aftrat hesum eigur í Sorø Detail Holding A/S, Korsør Detail A/S og Vipperød Detail ApS sum virka á marknaðinum fyri gerandisvørur í Danmark.

FK er ein føroysk keypsamtøka við áleið 14.000 limir. FK eigur og rekur fimm handlar við staðseting í Klaksvík, Fuglafjørður, Hoyvík, Miðvági, Trongisvági og Tórshavn.

Báðar keypssamtøkur eru limir í lutafelagnum Coop a.m.b.a., sum er átt av umleið 2. mió. limunum. Keypssamtøkurnar eru, hóast limaskapin, at meta sum sjálvstøðugar og virka ikki á sama landafrøðiliga marknað.

Yvirtøkan er skipa við, at eitt nýtt felag verður sett á stovn. FK letur sítt virksemi til nýggja felagið og fær ein ognanrætt á 50%, uttan atkvøðurætti. FOB fær við íløguni 50% í ognarskapi og allan atkvøðurættin.

Samanlegging er millum donsku keypssamtøkuna FOB, sum ikki hevur virksemi á føroyska marknaðinum og føroysku keypssamtøkuna FK sum er virkin á føroyska marknaðinum. Samanleggingin er tí at meta sum ein vatnrøtt samanlegging millum partar á sama vørumarknaði, sum tó virkað á ymiskum landafrøðiligum marknaðum. Tá ið vatnrøtt samanlegging fer fram í millum partar sum ikki hava virksemi á sama landafrøðiliga marknað, men virka á sama vørumarknað, skal metast um hvørt tað útlendska felagið er ein

møguligur kappingarneyti hjá FK, og í hvønn mun samanleggingin av hesi orsøk kann vera kappingaravlagandi.

Sambært vegleiðingini hjá ES-Kommissiónini (2004/C 31/03), skulu tvær treytir vera uppfyltar, fyri at talan er um ein møguligan kappingarneyt, sum munandi forðar fyri virknari kapping. Hesar treytir eru 1) at møguligi kappingarneyðtin longu hevur eina munandi avmarkandi ávirkan ella hægst sannlíkt at tann møguligi kappingarneyðtin verður ein effektivur kappingarneyti 2) Avmarkað tal av øðrum møguligum kappingarneytum, sum ikki kunna varðveita nøktandi trýst á kappingina eftir samanleggingina.

Út frá einar heildarmeting, við støði í viðkomandi marknaði hjá FOB og FK, er tað ósannlíkt, at samanleggingin kemur undir tær treytir, sum ES-Kommissiónin hevur sett. Hetta er tí at FOB ikki er á føroyska marknaðinum, og at tað eru fleiri virknir aktørar á føroyska marknaðinum fyri gerandisvørur. Taå er heldur ikki óhugsandi, at aðrar norðurlendskar fyritøkur síggja Føroyar sum ein viðkomandi marknað. Tískil er samanleggingin ikki mett at forða munandi fyri virknari kapping.

Kappingareftirlitið hevur við heimild í § 15, stk. 5, í kappingarlógini, tikið avgerð um, at góðkenna yvirtøkuna hjá FOB av FK, vísandi til § 15, stk. 2, í kappingarlógini um at ein yvirtøka, sum ikki munandi forðar fyri virknari kapping, skal góðkennast.

Terje Sigurðsson
Deildarstjóri

Teitur Friduson Andreasen
Fulltrúi